# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Tey stóru aftur á skíggjan



*Í fjør gjørdist Inzaghi stóri maðurin, tá hann skoraði bæði málini hjá Milan í finalusigrinum á Liverpool*
*Mynd: Polfoto*

**Í kvøld verða fyrstu dystirnir í bólkaspælinum í Champions League spældir. Og longu fyrsta kvøldið tykist talan verða um krás fyri fótbóltshyggjarar**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Síðani finaludystin í vár millum Milan og Liverpool hevur europiska meistarakappingin mest sum ligið í dvala. Gaman í hava undankappingardystir verið á skránni, og har hava føroysku meistararnir eisini tikið lut, men tað er ikki fyrr enn nú, at spenningurin gerst heilt veruligur.

Verða tað milliardirnar hjá Abramovich, sum loksins sigra, ella verða tað heldur meira siðvandu Barcelona, Real Madrid, Milan, Liverpool ella Manchester United, sum um átta mánaðir standa við steypinum við stóru oyrunum? Tað er kanska týdningarmesti spurningurin av øllum, men eisini undan tí eru nógvir spurningar at svara.

Og teir fyrstu av hesum verða altso svaraðir í dag og í morgin, tá fyrsta umfarið av bólkaspælinum verður spælt.

**Dystirnir í 1. Umfari - Týskvøldið**
Porto-Liverpool
Marseille-Besiktas
Chelsea-Rosenborg
Schalke04-Valencia
Olympiakos-Lazio
Real Madrid-Werder Bremen
Milan-Benfica
Shakhtar Donetsk-Celtic

**Mikukvøldið**
Barcelona-Lyon
Rangers-Stuttgart
Roma-Dynamo Kiev
Sporting Lissabon-Manch. Utd.
Fenerbache-Inter
PSV Eindhoven-CSKA Moskva
Arsenal-Sevilla
Slavia Prag-Steaua Bucharest

## Formulaliðið hesa vikuna




*Sosialurin mannar Formula-liðið við spælarunum, sum stóðu seg best í 22. umfarinum av Formula-kappingini*

## Málið endaði á bilum

Tað var fitt av vindi, tá GÍ og B36 skuldu spæla í Sarpugerði sunnudagin. Og longu undan dystarbyrjan høvdu onkrir av spælarunum hjá B36 fingið sær ein lítlan skelk. Málini, sum verða brúkt til spæl um hálvan vøll, vórðu sjálvandi flutt út um gyrðingina, men har fingu hvirlurnar fatur á málinum.

Úrslitið varð, at tríggir av bilunum hjá B36-spælarunum fingu nakrar snuddir. Ein av bilánarunum var Fróði Benjaminsen, men hann helt ikki, at orsøk var at gera stórvegis háva burtur úr hesum.

- Bilurin hjá Hanusi Thorleifsson fekk nakrar buglur á takið, og eisini fingu bilarnir hjá mær og Jóan Paula Jakobsen nakrar skeinur, men nakran álvarsligan skaða var talan tó ikki um, sigur hann.

**-mørk**

## Drillo skal venja Irak

Norski Egil Drillo Olsen, sum av mongum varð hataður fyri sína fótbóltsfatan, men sum samstundis leiddi Noreg móti altjóða hæddunum, skal nú virka sum landsliðsvenjari í Irak.

Mánadagin skrivaði hann nevnliga undir ein trý ára sáttmála við irakska fótbóltssambandið. Sum skilst, so vóru trygdarviðurskiftini hjá venjaranum sjálvum størsta forðingin, men eftir at hava fingið vissu fyri hesum, valdi Drillo at skriva undir sáttmálan.

Fyrr í ár vann Irak asiatiska meistaraheitið í fótbólti eftir finalusigur á Saudiarabia.